## VEÐRIÐ




**Veðrið í dag**
Andøvsgul upp í ein strúk av eystri, men sum fráliður lot til andøvsgul. Turt og sól av og á, men sum dagurin líður verður meira skíggjað. Hitin alt samdøgrið um 6 til 9 stig.




**Veðrið mikudagi og hósdagin**
Lot til andøvsgul av eystri og landssynningi. Turt og sól av og á. Hitin verður millum 4 og 9 stig.




**Veðrið fríggjadagin**
Gul til stívt andøvsgul av landssynningi. Turt og sólarglottar, men sum fráliður meira skýggjað. Hitin millum 6 og 9 stig.

# Í so lítil útróðrarbátur í Vágsbotni

**Í Vágsbotni eru gjørdar góðar umstøður hjá útróðrarbátum at leggja at og selja sína veiðu. Men seinasta leygardag legði ein í so lítil útróðrarbátur at í Vágsbotni. Talan var um modell seksæringin, "Dania" úr Miðvági**

FRÍTÍÐARÍTRIV
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Seinasta leygardag legði ein lítil útróðrarbátur at í Vágsbotni. Talan var um modellbátin, "Dania" úr Miðvági , við 55 ára gamla Eyðálvi Niclasen í Miðvági sum fjarstýrdum skipara.

Diana er ein modellbátur, ið er gjørdur í lutfallinum 1:6. Eyðálvur Niclasen hevur sjálvur gjørt bátin, ið er 1,5 m langur og 0,51 m breiður, svarandi til ein veruligan 28-30 fót bát.

Báturin er gjørdur úr træ og er bygdur upp sum ein vanligur føroyskur bátur. Hann hevur línuspæl og snellur, ið Eyðálvur sjálvur hevur gjørt úr aluminium. Alt virkar og er fjarstýrt.



*Eyðálvur Niclasen úr Miðvági við modell seksæringinum "Dania" í Vágsbotni*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Maskinan í bátinum er ein 12 volt motorur úr varmaapparatinum á einum bili, ið verður drivin av tveimum 12 volts accumulatorum.

Eyðálvur siglir við norskum skipi og hevur modellbátar sum frítíðarítriv. Hann hevur eisini eitt modell av trolaranum Høgafossi.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -6 |
| Nuuk | -2 |
| Qaqortoq | 1 |
| Ammassalik | 4 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 9 |
| Seyðisfjørður | 5 |
| Tórshavn | 7 |
| Lerwick | 7 |
| Aberdeen | 7 |
| London | 12 |
| Tromsø | 3 |
| Bergen | 13 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 8 |
| Keypmannah. | 12 |
| Helsinki | 1 |
| Moskva | 6 |
| Berlin | 14 |
| Warzawa | 16 |
| Kiev | 17 |
| Bukarest | 11 |
| Paris | 15 |
| Madrid | 15 |
| Róm | 14 |
| Malorca | 22 |
| Athen | -- |
| Malta | 17 |
| Tunis | 22 |
| Beijing | 16 |
| New Dehli | 35 |
| Bangkok | 35 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 22 |
| New York | 23 |
| Miami | 24 |
| Los Angeles | 16 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 33 |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 26 |

### LUFTTRÝSTIÐ






Eitt lágtrýst í ein útsynningi úr Íslandi ferðast spakulia vestureftir. Eitt tilhoyrandi brúgvalag í ein útsynning úr Føroyum flytur seg samsvarandi. Eitt hátrýst norðanfyri Lofoten flytur seg spakuliga suðureftir og kemur mikudagin yvir Føroyar.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 18/4 kl. $06^{00}$– 19/4. $06^{00}$. Hitin í gjár: 7,3°
Minsti hiti máldur í apríl: -9,9° - Mesti hiti máldur í apríl: 18,3°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,1 mm – mált frá 18/4 kl. $06^{00}$– 19/4 kl. $06^{00}$
Avfallið higartil í apríl: 64,4 mm

I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

Sosialurin

## VESTFALLSKYRRINDI

20. apríl

16. apr. Fyrra kvarter/- Mánin longst frá jørðini
24. apr. Fullmáni
29. apr. Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 20.apríl | 04.49 | 17.07 | 03.49 | 16.07 | 04.04 | 16.22 | 06.49 | 19.07 | 07.49 | 20.07 | 03.04 | 15.22 | 02.04 | 14.22 | 05.04 | 17.22 | 06.04 | 18.22 | 04.34 | 16.52 | 05.49 | 18.07 |
| 21.apríl | 05.25 | 17.53 | 04.25 | 16.53 | 04.40 | 17.08 | 07.25 | 19.53 | 08.25 | 20.53 | 03.40 | 16.08 | 02.40 | 15.08 | 05.40 | 18.08 | 06.40 | 19.08 | 05.10 | 17.38 | 06.25 | 18.53 |
| 22.apríl | 05.54 | 18.26 | 04.54 | 17.26 | 05.09 | 17.41 | 07.54 | 20.26 | 08.54 | 21.26 | 04.09 | 16.41 | 03.09 | 15.41 | 06.09 | 18.41 | 07.09 | 19.41 | 05.39 | 18.11 | 06.54 | 19.26 |
| 23.apríl | 06.32 | 18.52 | 05.32 | 17.52 | 05.47 | 18.07 | 08.32 | 20.52 | 09.32 | 21.52 | 04.47 | 17.07 | 03.47 | 16.07 | 06.47 | 19.07 | 07.47 | 20.07 | 06.17 | 18.37 | 07.32 | 19.52 |
| 24.apríl | 07.12 | 19.33 | 06.12 | 18.33 | 06.27 | 18.48 | 09.12 | 21.33 | 10.12 | 22.33 | 05.27 | 17.48 | 04.27 | 16.48 | 07.27 | 19.48 | 08.27 | 20.48 | 06.57 | 19.18 | 08.12 | 20.33 |

5 707265 100036 >